

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 06 - 2012

# Tórsborg - nýggja býarmyndin í Tórshavn

Í morgun tíðliga kom nýggjasta farið í føroyska flotanum, frálandaskipið Tórsborg á Havnina. Bráddliga er hon vorðin nýggjasta býarmyndin í høvuðsstaðnum eisini, sum sambært borgarstjóranum Heðin Mortensen, sær fram til at taka ímóti og hýsa tí slóðbrótandi frálandaflotanum hjá reiðararíinum Supply Service, ið nú flytur til Havnar, har skipini verða skrásett og har framtíðar bústaðurin hjá reiðarínum verður. Hjartaliga tillukku og vælkomin til Havnar, sum ein fegin borgarstjóri við Oljan.fo. Bert fáar metrar frá Bursatanga, har Tórsborg hevur lagt at landi, er enn ein borg, nýggi skrivstovubygningurin hjá Supply Service við at koma undir land. Ein kann tí við røttum siga, at Tórsborg er ikki bert eitt nýbrot fyri føroyska vinnu, hon er eisini ein nýggj byrjan hjá Tórshavn at vera partur av tí spennandi og áhugaverdu menningini av tí føroyska frálandaflotnum. Ì dag klokkan 14 verður móttøka fyri skipinum og fer Durita Hansen tá at navngeva skipið í tess framtíðar heimliga umhvørvi. Tórsborg er tað fjórða frálandaskipið hjá Supply Service innan seinastu trý árini. Hini skipini eru Eldborg, Sæborg og Sjóborg. Øll skipini eru skrásett í FAS og hava føroyskar manningar burturav. Tilsamans telja tær umleið 100 fólk. Aftrat teimum koma so fólkini á landi. Eftir móttøkuna í dag er opið skip og kunnu øll koma umborð at síggja eitt dygdarskip, sum longu í morgin fer til arbeiðis í altjóða oljuvinnuni undir føroyska Markinum. Oljan.fo ynskir Supply Service hjartaliga tillukku við tí hesusm stolta fari og góða eydnu. NB - Sí eisini myndarøðina Tórsborgir í Tórshavn. Mynd - Tórsborg nýggja býarmyndin í Tórshavn. Mynd oljan.fo/Jan Müller